**Starvsskipan fyri Heilivágsráðið, galdandi frá 11. september 2018**

*Við heimild í avgerð hjá landsstýrismanninum í heilsumálum frá 10. februar 2011 um stovnsetan av Heilivágsráðið til at umsita serstakan sjúkrahúsheilivág, verður niðanfyri standandi starvsskipan ásett:*

**Heilivágsráðið**

§ 1. Heilivágsráðið hevur ábyrgd av yvirskipaðu umsitingini av skipanini fyri serstakan sjúkrahúsheilivág á konto 11.20.3.19.

§ 2. Heilivágsráðið er mannað við einum formanni, og fimm limum umboðandi fylgjandi stovnar/deplar:
1. Stjórin á Landssjúkrahúsinum
2. Varastjóri á Landssjúkrahúsinum við læknaútbúgving
3. Leiðandi yvirlækni á Medisinska Deplinum
4. Landsapotekarin
5. Sjúkrahúsfarmaceuturin á Tjaldurs Apoteki
6. Umboð fyri Heilsumálaráðið

**Málsræði**

§ 3. Heilivágsráðið fylgir í høvuðsheitum Medicinrådet í Danmark. Meginreglan er at brúka bíligasta valmøguleika undantikið í serligum førum. Heilivágsráðið hevur niðanfyri standandi uppgávur:
1. Stýra gongdini og hava eftirlit við nýtsluni av dýrum sjúkrahúsheilivági
2. Gera tilmælir til landsstýrismannin um raðfestingar í málum, sum verða mett at hava týðandi fíggjarligar avleiðingar fyri játtanina til serstakan sjúkrahúsheilivág.
3. Ráðgeva landsstýrismanninum og áseta leiðreglur um nýtsluna av dýrum sjúkrahúsheilivági í sjúkrahúsverkinum.
4. Viðgera umbønir um broytingar í góðkendum tilbúningum til sjúklingabólkar.
5. At útinna eftirlit við nýtsluni av dýrum sjúkrahúsheilivági, herundir kunning til Heilsumálaráðið.
6. Seta í verk stundisliga ávaringarskipan (early warning).

**Uppgávurnar hjá skrivstovuni og formanninum**

§ 4. Skrivstovuarbeiðið hjá Heilivágsráðnum verður gjørt av skrivara/fulltrúa, sum er staðsettur á Landssjúkrahúsinum.
Stk.2. Formaðurin og skrivstovan útinnir avgerðir hjá Heilivágsráðnum, og hevur um hendi ta dagligu umsitingina av skipanini.

§ 5. Formaðurin í Heilivágsráðnum leggur til rættis og leiðir fundirnar í ráðnum.
Stk. 2. Formaðurin kann gera av, at skrivligt tilfar ikki verður býtt út fyrr enn á einum ráðsfundi og verður latið aftur, tá fundurin er lokin.

§ 6. Heilivágsráðið hevur fund á teimum fundardøgum, sum ráðið hevur viðtikið, og annars so oftani, sum formaðurin metir, at tørvur er á at hava fund.

Stk. 2. Kallað verður inn til fundar við eini freist upp á í minsta lagi 7 dagar, um ikki formaðurin tekur aðra avgerð vegna tað, at eitt mál hevur skund.
Stk. 3. Við fundarinnkallingini skal fylgja ein dagsskrá, sum so vítt møguligt skal tilskila, hvørji mál skulu viðgerast á fundinum, og hjálagt skal verða tað tilfar, sum er neyðugt til tess at viðgera málini, sbr. tó § 5, stk. 2.
Stk. 4. Limir sum ikki kunnu møta til fundar, skulu boða skrivstovuni hjá Heilivágsráðnum frá hesum skjótast gjørligt.
Stk. 5. Skrivarin/fulltrúin og onnur starvsfólk á Landssjúkrahúsinum kunnu eftir avgerð formansins, luttaka á fundum hjá ráðnum, tó við ongum atkvøðurætti.

**Dagsskrá**
§ 7. Føst punkt á dagsskránni fyri fundir í Heilivágsráðnum eru hesi:
1. Góðkenning av fundarfrásøgn frá seinsta fundi.
2. Frágreiðing um fíggjarstøðuna á kontoini fyri serstakan sjúkrahúsheilivág.
3. Innkomin mál

**Atkvøðureglur og gerðabók**
§ 8. Heilivágsráðið er viðtøkuført, tá formaðurin, ella næstformaðurin, um formaðurin ikki er á fundi, og í minsta lagi 2 av hinum limunum, eru hjástaddir.
Stk. 2. Heilivágsráðið tekur avgerð við vanligum atkvøðumeiriluta. Í førum, har tað stendur á jøvnum millum atkvøðurnar, er atkvøðan hjá formanninum ella næstformanninum, um formaðurin ikki er á fundi, avgerandi.

§ 9. Fyri hvønn fund í Heilivágsráðnum verður gjørd fundarfrásøgn, har tilskilað verður:
1. Hvørjir limir hava verið við í viðgerðini av málunum.
2. Avgerðin hjá Heilivágsráðnum í teimum einstøku málunum. Um atkvøtt hevur verið, verður atkvøðutalið og atkvøðubýtið tilskilað.
3. Minnilutasjónarmið og orsøkir til hesi í tann mun tað er neyðugt.
4. Avgerðir um ógegni, sbr. § 10. Limur, sum er mettur at vera ógegnigur kann krevja, at hansara mótmæli ímóti avgerðini hjá Heilivágsráðnum viðvíkjandi ógegnisspurningi verður skrivað í fundarfrásøgnina.
Stk. 2. Limirnir í Heilivágsráðnum skulu í seinasta lagi 7 dagar eftir ein fund hava fingið fundarfrásøgn sendandi. Mótmæli og uppskot til rættingar til fundarfrásøgnina frá teimum limum sum vóru á fundi, verða skrivliga send Heilivágsráðnum í seinasta lagi 7 dagar eftir, at nevndu limir hava móttikið fundarfrásøgnina.

**Ógegni og tagnarskylda**
§ 10. Ein limur í Heilivágsráðnum kann ikki taka avgerð ella vera við í viðgerðini av einum máli, um so er, at limurin er ógegnigur eftir fyrisitingarlógini.
Stk. 2. Ein limur, sum gerst kunnigur við umstøður, sum kunnu skapa iva um gegnið hjá viðkomandi, skal sum skjótast boða formanninum frá hesum.
Stk. 3. Heilivágsráðið ger av, uttan at viðkomandi limur luttekur, um viðkomandi er ógegnigur.

§ 11. Limirnir í Heilivágsráðnum hava tagnarskyldu eftir reglunum um tagnarskyldu í fyrisitingarlógini.

**Gildiskoma**

§ 12. Henda starvsskipan kemur í gildi 11. september 2018.

Heilsumálaráðið hin 10. september 2018

Sirið Stenberg
Landsstýrismaður

Turid Arge
aðalstjóri